# VARPIÐ



DR1 • Mikudagin kl. 19.00
*DR1 Dokumentaren:*

### Pokerhajerne

Fleiri og fleiri danir íðka poker-spælið sum meira enn bara eitt ítriv. Tað eru tó teir fæstu, sum megna at flygja dreingjadreyminum. Nakrir megna tó hetta, og Poul Martinsen hevur verið við sjey av hesum til HM-kappingina í Las Vegas.



TV3 • Mikudagin kl. 23.55

### Skjulte øjne

Lammaði Jason Kemp er skelkaður, tá hann verður vitni til tað, sum líkist einum morði í íbúðini yvir av hansara. Løgreglan er ikki til serliga stóra hjálp, men starvsfelagin hjá Kemp, Claudia, heldur hetta ljóðar spennandi, og hon fer at kanna málið saman við Jason. Men drápsmaðurin tykist vita av, hvør eltir slóð hansara…



Canal+Film1 • Fríggjadagin kl. 19.00

### Because of Winn-Dixie

Einsamalla Opal er júst flutt til ein nýggjan bý saman við pápanum, ið er prestur. Tá hon verður góð við ein heimleysan hund, verður lív hennara brádliga og púrasta kollvelt.

Canal+Film1 • Hósdagin kl. 19.00

## MIN DATE MED DREW

**Síðani hann sum 6-ára gamal sá E.T., hevur Brian Herzlinger verið forelskaður í Drew Barrymore, og dreymur hansara er at hitta hana. Hann er arbeiðsleysur, men nú hann júst hevur vunnið 1100 dollarar, ætlar hann at nýta komandi 30 dagarnar til at gera dreymin til veruleika.**

Sosialurin

FRÍGGJADAGUR 16. FEBRUAR 2007

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**